# Badmintontúrur til Island februar 2024

HBF ætlar aftur hetta kappingarárið at skipa fyri eini ferð til Reykjavik International Games (RIG), har møguleiki er fyri at luttaka í badmintonkappingini.

Hesuferð verður túrurin frá fríggjadegi 2. feb. - mánadag 5. feb. 2024, og sjálv kappingin er 3. og 4. februar í Laugardali í Reykjavík.

Kappingin er ein opin kapping, og er fyri allar leikarar frá U13 – U19. Ein stuttleika-kapping hevur eisini verið fyri U11 leikarum, um vit ynskja tað, men hendan er bert sunnudagin og eingin vinnari verður kosin. Øll fáa gullmedalju. U11 leikararnir hava eisini møguleika at verða við í tvímansleik kappingini leygardag, hjá U13.

Túrurin er skipaður sum ein familjutúrur. Øll børn sum melda til, skulu verða knýtt at onkrum vaksnum persóni, hetta mugu leikararnir (foreldrini) sjálvir syrgja fyri. HBF hevur venjarar og ferðaleiðara við, sum hava ábyrgd av túrinum og kappingini, men ikki av leikarunum.

Luttøkan krevur nógva planlegging og tí er umráðandi, at vit í HBF fáa afturmelding **í seinasta lagi 28. nov.** frá limum, sum hava áhuga í at luttaka á RIG.

**Gjald**
Leikararnir mugu sjálvir gjalda fyri túrin. Ein leys meting sigur, at túrurin kemur at kosta uml. 4300 kr. Vit eru sjálvandi øll áhugaði at túrurin verður so bíligur sum møguligt. Ein møguleiki er at samla pengar við at skipa fyri ymiskum tiltøkum. Hetta krevur nógva hjálp frá bæði leikarum og foreldrum og eru øll hugskot vælkomin.

**Gisting**
Vit búgva á Reykjavík City Hostel (skift navn til DALUR HI Hostel) Vit hava bílagt 2-, 4-, og 6-mans kømur.

GG. Í ár ber bert til at melda seg til samlaða túrin og ikki bara flogferð ella bara hotel

**Tilmelding**
Tey sum hava hug at koma við til Íslands skulu melda seg til í Klubmodul, har kemur at liggja eitt leinki, allir limir fáa teldupost tá tilmeldingin er klár.

Plássini eru avmarkað og tí er at skunda sær. Skipanin sigur frá tá tað er fult teknað.

Tilmeldingin er bindandi og 1000 kr. skulu gjaldast við tilmelding. Tilmeldinign verður í klubmodul. Leinki verður lagt út á facebook og sent í teldupost til allar limir.

**Kunnandi fundur**
HBF at skipa fyri einum kunnandi fundi fyri luttakarum og foreldrum, sum ynskja við til Íslands. Tíð og stað verður kunngjørt seinni.

**Um tit hava spurningar hesum viðvíkjandi, eru tit vælkomin at ringja til umboð í nevndini, á tlf. 289400 ella senda teldupost til** havnarbadmintonfelag@gmail.com**.**